## Hon eitur frælsi

**Brot úr røðu løgmans í samband við at standmynd av stabbagróti varð avdúkað á Tvøroyri sunnudagin tann 29. august**

TÍÐINDASKRIV
*Løgmansskrivstovan*

Góða samkoma
Tað er ikki á hvørjum degi, at vit á Tvøroyri avdúka eina standmynd við røðu, tónleiki og kórsangi. Men hetta er heldur ikki ein standmynd av tí vanliga slagnum. Tað er ikki ein standmynd av onkrum úrmælingi, sum eftirtíðin skal minnast, men ein standmynd av nøkrum, sum vit hava sæð hvønn Guðs skapta dag – ein standmynd av okkara egna heimaumhvøvi – av okkara egnu oyggj – av okkara egna landi.

...Sermerkta stabbagróti, sum sæst nógva staðni í Suðuroy, er partur av niðastu og elstu jarðfrøðini á landi í Føroyum.

...Standmyndin ímyndar við øðrum orðum tað, sum altíð hevur verið, og tað, sum kemur og fer. Stabbagrótið hevur altíð verið her og fer altíð at vera her, men fuglurin flýgur frælsur – fer avstað, men vendir altíð heimaftur til Føroya.

...Standmyndin hevur fingið heitið »Frælsi«. Uttan at fara út í tær stóru útleggingar av hesum lítla fitta orðið, sum týðir nakað serligt fyri hvønn einstakan okkara, so lat meg enda við vøkru yrkingini hjá Bjørn Afzelius, sála, sum Steintór Rasmussen umsetti til føroyskt:

*»Frælsi er títt vakra navn*
*Góðlæti er tín stólta móðir*
*Rættvísi er tín bróður*
*Fríðurin tín systir*
*Stríðið er tín faðir*
*Framtíðin tín ábyrgd*
*Frælsi er títt vakra navn«*

Takk fyri.

**Jóannes Eidesgaard, løgmaður**

# Økið um Vesturkirkjuna fríðkað

**Síðani november mánaða í fjør hevur verið arbeitt á økinum vestan fyri Vesturkirkjuna. Nú hómast úrslitið, og arbeiðið verður ætlandi liðugt 1. oktober. Millum annað verður ein standmynd av Sigmundi Brestisyni á økinum**

KIRKJULUNDIN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Fremst sæst fundamentið, sum standmyndin av Sigmundi Brestissyni skal standa á. Aftanfyri sæst hólmurin, ið fer at vera mitt í tjørnini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Ætlanin er, at kirkjulundin, sum økið nú verður nevnt, skal verða eitt alment pláss, har øll kunnu fara at hugna sær.

Marius Müller á býráðnum, sum hevur teknað lundina, sigur, at høvuðselementið í lundini verður ein tjørn við einum hólmi í miðjuni og flísalagdari gøtu rundanum. Eisini verður eitt lítið torg við beinkjum, har ein standmynd kemur at standa.

– Økið er ætlað øllum borgarum at brúka, og flísarnir gera tað eisini vinarligt fyri rørslutarnað. Har eru trappur, men har er eisini ein flísaløgd gøta, júst ætlað rørslutarnaðum, greiðir Marius frá.

### Sílini ikki gloymd

Rættará, sum hevur runnið ígjøgnum økið, er nú farin undir heilt, har tjørnin fer at vera.

Men hóast tað, fer vatn úr ánni framvegis at síggjast á økinum. Ætlanin er nevniliga, at vatn úr Rættará skal fylla tjørnina. Tvær slúsur verða ímillum tjørnina og ánna, soleiðis at vatn altíð verður í tjørnini.

Sílini, sum altíð hava verið í Rættará, eru heldur ikki gloymd í nýggju ætlanini. Marius sigur, at alt er gjørt fyri at fáa síl í tjørnina.

– Hetta eru áarsíl, sum aldri fara úr ánni, og ætlanin er, at fáa tey at koma í tjørnina. Eisini er ætlanin at fáa dunnur ella okkurt tílíkt at vera úti á hólminum. Fólk skulu tíma at at sita í lundini og tað skal vera hugnaligt, staðfestir Marius.

### Sigmundur Brestisson

Eisini skal ein standmynd setast upp á økinum. Talan er um eina standmynd av Sigmundi Brestissyni, sum listamaðurin Hans Pauli Olsen skal gera.

Marius sigur, at hóast fundamentið til standmyndina verður gjørt í hesum døgum, so er standmyndin ikki bíløgd enn.

– Hon fer at koma einaferð í framtíðini, men ikki júst nú. Nú skulu vit fyrst hava alt arbeiðið liðugt, so økið kann takast í nýtslu, sigur hann.

Hann leggur tó afturat at Hans Pauli Olsen hevur gjørt eina lítla modellmynd av Sigmundi Brestissyni, og at standmyndin heilt víst fer at standa uttanfyri Vesturkirkjuna í framtíðini.

### Liðugt 1. oktober

Víðari sigur hann, at kílaskapið á kirkjutorninum fer at speglast aftur í stórum steinum, ið eru lagdir út í tjørnina. Standmyndin fer at standa hinumegin tjørnina, beint árakað kirkjutornið. Framvið tjørnini eru eisini nakrir flísar myrkari enn hinir, og tað er kirkjan, ið »speglast« aftur í flísunum.

Marius sigur, at talan hevur verið um at gera hetta arbeiðið í nógv ár. Nú vóru ráðini til tað, so í november í fjør varð farið í gongd. Kirkjan hevur fíggjað ein part av arbeiðnum sjálv og býráðið hevur stuðlað.

Alt arbeiðið skal ætlandi vera liðugt 1. Oktober.

– Fyrst í oktober mánaði verða fermingar í kirkjuni, og tá skal arbeiðið allarhelst vera liðugt, so økið er pent og ruddiligt tá fermingarnar vera, sigur hann.

Hann sigur annars, at arbeiðið eftir ætlanini átti at verið liðugt nú, men at tað er seinkað einar tríggjar mánaðir.

– Økið er ótrúliga vakurt, við nógvari grótlaðing. Tað er arbeiði, sum tekur tíð og sum ikki kann skundast ígjøgnum, tískil bleiv tað nakað seinkað. Men nú sæst ein endi á tí, sigur Marius Müller at enda.

# Móttøka hjá FøroyaTele

**10. september verður almenn móttøka í nýggja bygninginum hjá Føroya Tele í Hoyvík. Nærum øll starvsfólkini eru longu flutt niðan til Hoyvíkar, og eru sostatt komin undir sama tak**

MÓTTØKA
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*10. september verður alt arbeiðið væntandi liðugt, og tá verður stór almenn móttøka í nýggju hølunum hjá FøroyaTele*

Andras Róin, stjóri á FøroyaTele, sigur, at ætlanin er at hava eitt størri tiltak, tá móttøkan verður.

– Tað verður nokk nøkulunda tað sama, sum tá almennar mottøkur eru, við røðum og tílíkum, sum plagar at vera. Men vit ætla at gera eitt sindur meiri burturúr, við sangi, tónleiki og skemti eisini, sigur Andras Róin.

Eisini verður framsýning av húsinum.

– Tað er eitt sindur ringt at fyrireika tílíkt, tí av tí at tað er alemnn mótøka, vita vit jú ikki hvussu nógv fólk kemur. Men vit vænta so at síggja samstarvspartanarar, starvsfólk við familju og kundar okkara.

### Eru longu flutt

Andras sigur, at tey allarflestu starvsfólkini longu eru flutt niðan í nýggju hølini í Hoyvík, men at tey hava bíðað við móttøkuni, tí handverkarar hava gingið og tikið hond um tað síðsta. Men 10. september verður arbeiðið tó væntandi liðugt.

– Enn eru nøkur fá starvsfólk niðri á Tinghúsvegnum. Tey taka hond um teknikkin, sum framvegis ikki er fluttur niðan í nýggju hølini. So eru eini 20 starvsfólk, sum starvast á Teledeplinum í miðbýnum. Tey fara so ikki at koma niðan higar, tí tey taka sær av allari fysiskari kundatænastu, greiðir Andras Róin frá.

Hann sigur, at tað verður nakað langt hjá kundum at koma heilt niðan til Hoyvíkar, um tey bert skulu okkurt ørindi í Teledeplinum. Tí verður handilin verandi niðri í býnum.

– Burtursæð frá teimum, eru øll um at koma upp á pláss her uppi í Hoyvík, og vit hava framvegis rúm fyri eitt sindur av fólki afturat, sigur Andras.

Í hesum døgum verður arbeitt við at fyrireika stóru almennu móttøkuna. Skráin er um at vera endaliga løgd, og lýst verður nærri í bløðunum, tá alt er fastlagt.

Bilar
Nr. 166 • hósdagur • 2. september 2004 • 78. árg.



*BMW-3 líkist nógv BMW-5 úr hesum vinklinum. Bilurin verður framvegis drivin av bakhjólunum*




*Nýggi BMW-3, sum kemur á marknaðin komandi summar, verður eyðkendur av nýggja BMW-stýlinum*

# Nýggjur BMW-3 í 2005



**Á altjóða bilaframsýningini í Genéve í mars 2005, verður nýggi BMW-3 fyrstu ferð alment sýndur fram, men longu nú er likið út, hvussu hann kemur at síggja út. Bilurin líkist teimum størru BMW og verður framvegis drivin av bakhjólunum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

BMW-3 hevur í mong ár verið tann mest týðandi bilurin hjá BMW verksmiðjuni í München, og tann sum hevur givið mest avkast til fyritøkuna. Tí er tað av stórum týdningi, at kundarnir taka væl ímóti bilinum.

Nýggi BMW-3 verður nakrar sentimetrar longri og breiðari enn forgangarin.

Bilurin kemur fyrst sum sedan, seinni koma coupé, stationcar og cabriolet. Ein broyting verður tó, at í nýggja modellunum koma coupé og cabriolet útgávurnar at skifta navn til BMW-4.

BMW-3 verður enn sum áður drivin av bakhjólunum og servostýringin verður hydraulisk.

16" hjól verða standard á 4 syl. útgávunum og 17" hjól á 6 syl. útgávunum.

Nýggi BMW-3 kemur á marknaðin komandi summar.





*BMW-3 innan – eins og teir størru BMW við I-drive systeminum*